

# Skansi aftur sáttmála við Statoil

**Jan Müller**

03.03.2014 - 12:17

Oljan.fo

Føroyska frálandareiðaríið, Skansi Offshore hevur aftur gjørt sáttmála við norska oljufelagið Statoil, hesaferðum leigu av Sjóborg.

Sáttmálin er fyri tríggjar mánaðir fyribils og við møguleika fyri at longja sáttmálan við trimum mánaðum aftrat. Sáttmálin er galdandi frá 28. mai í ár og er sum so framhald av verandi sáttmála, sum tá gongur út.

Í desember mánað í fjør longdi Statoil sáttmálan við enn eitt av skipunum hjá Skansi Offshore, Eldborg, við 8 mánaðum. Eldborg er veitingarskip hjá heimsins største boriskipi, Discoverer of America, sum borar fyri Statoil út fyri Eysturafrika.

Statoil boðar í hesum døgum frá, at tað hevur júst gjørt væleydnaðan test av gassbrunni í tanzanikianskum sjógvi, har felagið hevur gjørt fleiri stór gassfund.

Keldur

Skansi.fo

Offshore.com